# P/F VÁGATUNNILIN

## TÓRSHAVN

## ÁRSFRÁSØGN

## 2009

**(11. ROKNSKAPARÁR)**

**AVRIT**

## INNIHALDSYVIRLIT


Síða

**Leiðslufrágreiðing v.m.**

Upplýsingar um felagið ........ 2

Leiðslufrágreiðing ........ 3

Høvuðs- og lyklatøl ........ 4

**Átekningar**

Leiðsluátekning ........ 5

Átekning frá óheftum grannskoðara ........ 6

**Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2009**

Rakstrarroknskapur 2009 ........ 7

Fíggjarstøða pr. 31. desember 2009 ........ 8 - 9

Gjaldførisfrágreiðing 2009 ........ 10

Notur ........ 11 - 13

Nýttur roknskaparháttur ........ 14 - 17

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | P/F Vágatunnilin<br>Skansavegur 7<br>100 Tórshavn | |
| | Telefon: | 35 02 00 |
| | Telefax: | 35 02 01 |
| | Heimasíða: | www.tunnil.fo |
| | Teldubústaður: | tunnil@tunnil.fo |
| | V-tal: | 485.209 |
| | Skattakommuna: | 100 Tórshavn |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| | Stovningardagur: | 21. desember 1998 |
| **Nevnd** | Jens Kári Vilhelm, verkfrøðingur, Hoyvík, formaður<br>Dánial Thomsen, fíggjarleiðari, Sandavágur, næstformaður<br>Mathea Hilduberg, cand. merc. í marknaðarføring, Tórshavn<br>Marita Hentze, verkfrøðingur, Argir | |
| **Stjórn** | Uni Danielsen, Hoyvík, stjóri | |
| **Fíggjarleiðari** | Reinhold Isaksen, búskaparfrøðingur, Norðragøta | |
| **Grannskoðan** | **Sp/f Grannskoðaravirkið *INPACT***<br>løggilt grannskoðaravirki<br>R. C. Effersøesgøta 26<br>Postrúm 191, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefax: 31 38 15<br>T-postur: inpact@inpact.fo<br>Heimasíða: www.inpact.fo | |

Ársfrásøgnin 2009 er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann

________________

fundarstjóri

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING 2009

### Virksemi

Endamál felagsins er at útvega fast samband millum Streymoy og Vágoy, hava rakstur og fasta sambandið um hendi, umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið. Felagsins virksemi í farna ári hevur í høvuðsheitum verið at reka tunnilin undir Vestmannasundi og annars at gera neyðugar ábøtur. Undirsjóvartunnilin varð latin upp fyri almennari ferðslu 10. desember 2002.

### Lógargrundarlag

Partafelagið varð stovnað við 20,3 mió.kr. í løgujáttan á fíggjarløgtingslógini og eykajáttanarlógini fyri 1998. Ognarrættur, eftirlit, peningajáttan 160,3 mió.kr., krøv til felagið, nýtslugjøld, ognartøka, skattlig viðurskifti, eftiransing og kunning eru ásett í Ll. nr. 6 frá 08.02.2000 (Anleggslógin) um "fast samband um Vestmannasund".

### Fíggjarliga gongdin

Umsetningurin var í 2009 22,8 mió.kr., og er hetta 2,2 mió.kr. betri enn mett í fíggjarætlanini, sum varð løgd fyri 2009. Ferðslan var umleið tann sama sum árið frammanundan. Av tí at heldur fleiri valdu at gjalda fyri stakar túrar, heldur enn at keypa kubba, hækkaði miðalprísurin fyri hvørt akfar við uml. 3,1%. Bruttoúrslitið lækkaði við 0,8 mió.kr. í mun til 2008. Hetta kemur í høvuðsheitum av fleiri avsetingum uppá vøru- og tænastuáogn í mun til árið frammanundan. Endaliga úrslitið gjørdist eitt avlop uppá 0,4 mió.kr., sum er umleið tað sama sum árið frammanundan.

### Menningarkostnaður

Felagið hevur havt ávísan kostnað til kunnandi tiltøk og tilfar.

### Íløgur

Felagið hevur ongar íløgur gjørt í árinum.

### Hendingar aftaná roknskaparárslok

Frá statusdegnum og til í dag er einki hent, sum avgerandi broytir metingina av ársfrásøgnini.

### Framtíðarútlit

Leiðsla felagsins væntar, at árið 2010 fíggjarliga verður verri enn staðfesta úrslitið í 2009.

### Partaeigaraviðurskifti

Partapeningurin er kr. 160.300.000. Allur partapeningurin er ogn landsins.

## HØVUÐS- OG LYKLATØL

| t.kr. | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl** | | | | | |
| Bruttuúrslit | 18.732 | 19.506 | 21.644 | 24.800 | 20.728 |
| Rakstrarúrslit | 3.266 | 3.736 | 6.549 | 9.751 | 5.607 |
| Úrslit av fíggjarpostum | -2.774 | -3.211 | -4.283 | -5.304 | -5.972 |
| **Ársúrslit** | **403** | **430** | **1.858** | **3.651** | **-259** |
| Fíggjarstøða tilsamans | 230.393 | 264.848 | 267.658 | 269.077 | 274.956 |
| **Eginogn** | **163.794** | **163.391** | **162.960** | **161.102** | **157.451** |
| Íløgur í materiella støðisogn | 0 | 89 | 222 | 1.118 | 2.011 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Ognaravkast | 1,3% | 1,4% | 2,4% | 3,6% | 2,0% |
| Trygdarevni | 71,1% | 61,7% | 60,9% | 59,9% | 57,3% |
| Renta av eginogn | 0,2% | 0,3% | 1,1% | 2,3% | -0,2% |

**LEIÐSLUÁTEKNING**

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2009 hjá P/F Vágatunlinum.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ársroknskaparlógina og galdandi roknskaparleiðbeiningar.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni, rakstrarúrslitinum og peningastreyminum.

Ársfrásøgnin verður hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 25. mars 2010

Stjórn: Uni Danielsen

| | | |
|---|---|---|
| Nevnd: | Jens Kári Vilhelm<br>formaður | Dánial Thomsen<br>næstformaður |
| | Mathea Hilduberg | Marita Hentze |

## ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til eigaran í P/F Vágatunlinum**

**Átekning á ársfrásøgnina**
Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá P/F Vágatunlinum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2009 við leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn, peningastreymi og notum. Ársfrásøgnin er gjørd eftir ársroknskaparlógini.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársfrásøgn kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2009 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2009 samsvarandi ársroknskaparlógini.

Tórshavn, tann 25. mars 2010

**Sp/f Grannskoðaravirkið *INPACT***
løggilt grannskoðaravirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

**RAKSTRARROKNSKAPUR**
**1. januar - 31. desember**

| | Nota | 2009 | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| **Nettosøla** | | **22.795.641** | **21.665** |
| Endurgjald, umsiting Norðoyatunnilin | | 2.364.190 | 2.439 |
| Rakstrarkostnaður | | -5.048.218 | -3.255 |
| Fyrisitingarkostnaður | | -1.379.614 | -1.343 |
| **Bruttoúrslit** | | **18.732.000** | **19.506** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -3.343.898 | -3.511 |
| Avskrivingar | 2 | -12.122.125 | -12.260 |
| **Rakstrarúrslit** | | **3.265.977** | **3.736** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 261.053 | 736 |
| Fíggjarligur kostnaður | | -3.035.120 | -3.947 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **491.909** | **525** |
| Skattur av ársúrsliti | 4 | -88.544 | -94 |
| **Ársúrslit** | | **403.366** | **430** |

**Uppskot til býti av ársúrsliti**

| | | |
|---|---|---|
| Flutt úrslit | 403.366 | 430 |
| **Býtt tilsamans** | **403.366** | **430** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| OGN | Nota | 2009 | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| Lendi, vegir og undirsjóvartunnil | | 223.017.178 | 234.397 |
| Tøkniogn | | 845.718 | 1.568 |
| Rakstrartól og innbúgv | | 170.473 | 191 |
| **Materiell støðisogn** | 2 | **224.033.368** | **236.155** |
| **STØÐISOGN** | | **224.033.368** | **236.155** |
| Kubbar | | 302.086 | 370 |
| Eykalutagoymsla | | 189.787 | 190 |
| **Vørugoymslur** | | **491.874** | **560** |
| Áogn frá sølu | | 1.791.039 | 3.013 |
| Meirvirðisgjald | | 312.568 | 223 |
| **Áogn** | | **2.103.607** | **3.236** |
| Innlánspeningur | | 3.764.589 | 24.897 |
| **Peningur** | | **3.764.589** | **24.897** |
| **OGN Í UMFERÐ** | | **6.360.070** | **28.693** |
| **OGN TILSAMANS** | | **230.393.438** | **264.848** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| SKYLDUR | Nota | 2009 | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| Partapeningur | | 160.300.000 | 160.300 |
| Flutt úrslit | | 3.493.955 | 3.091 |
| **EGINOGN** | 3 | **163.793.955** | **163.391** |
| Útsettur skattur | | 1.386.352 | 1.298 |
| **AVSETTAR SKYLDUR** | 4 | **1.386.352** | **1.298** |
| Íleggingargrunnurin fyri Føroyar | | 42.061.739 | 79.578 |
| **Langfreistað skuld** | 5 | **42.061.739** | **79.578** |
| Avdráttir, veðskuld næsta ár | 5 | 11.583.600 | 10.000 |
| Avsett frítíðarløn | | 30.543 | 31 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 551.646 | 1.135 |
| Frammanundan goldin kubbahald | | 5.942.567 | 5.643 |
| Trygd, kubbar | | 1.720.800 | 1.626 |
| P/F Norðoyatunnilin, millumrokning | | 3.322.235 | 2.148 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **23.151.392** | **20.582** |
| **SKULD** | | **65.213.132** | **100.160** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | | **230.393.438** | **264.848** |

**GJALDFØRISFRÁGREIÐING**
**1. januar - 31. desember**

| | 2009 | t.kr. 2008 |
|---|---|---|
| Rakstrarúrslit | 3.265.977 | 3.736 |
| Avskrivingar | 12.122.125 | 12.260 |
| | **15.388.101** | **15.995** |
| Broytingar í ogn í umferð | | |
| Vørugoymslur | 67.830 | -119 |
| Áogn frá sølu | 1.221.767 | -955 |
| Meirvirðisgjaldsáogn | -89.723 | 43 |
| | | |
| Broytingar í stuttfreistaðari skuld | | |
| Frammanundan goldin tænastugjøld | 299.372 | 550 |
| Vøru- og tænastuskuld | 590.772 | -8.010 |
| | | |
| **Gjaldførisúrslit frá rakstri áðrenn fíggjarpostar og skatt** | **17.478.119** | **7.504** |
| | | |
| Fíggjarligar inntøkur | 261.053 | 736 |
| Fíggjarligur kostnaður | -3.035.120 | -3.947 |
| | | |
| **Gjaldførisúrslit, rakstur** | **14.704.052** | **4.293** |
| | | |
| Broyting, íløgur tøkniogn | 0 | -19 |
| Broyting, íløgur rakstrartól og innbúgv | 0 | -70 |
| | | |
| **Gjaldførisúrslit, íløgur** | **14.704.052** | **4.204** |
| | | |
| Inngjøld, trygd kubbar | 95.300 | 168 |
| Broyting, lán Íleggingargrunnurin | -35.932.201 | 3.958 |
| | | |
| **Gjaldførisúrslit, fígging** | **-21.132.849** | **8.330** |
| | | |
| Tøkur peningur við roknskaparbyrjan | 24.897.438 | 16.568 |
| | | |
| **Tøkur peningur við roknskaparlok** | **3.764.589** | **24.897** |

## NOTUR

| | 2009 | t.kr. 2008 |
|---|---|---|
| **Nota 1. Starvsfólkakostnaður** | | |
| Starvsfólk í miðal | 8 | 8 |
| | | |
| **Samlaður starvsfólkakostnaður:** | | |
| Lønir | 2.950.795 | 3.087 |
| Lønarendurgjald | -41.129 | 0 |
| Eftirlønir | 255.265 | 245 |
| Almenn lønargjøld | 99.286 | 105 |
| Starvsfólkakostnaður | 79.681 | 74 |
| | **3.343.898** | **3.511** |

| **Nota 2. Materiell støðisogn** | Lendi, vegir og undirsjóvartunnil | Tøkni og maskinur | Rakstrartól og innbúgv |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2009 | 302.065.074 | 6.592.859 | 884.061 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2009** | **302.065.074** | **6.592.859** | **884.061** |
| | | | |
| Avskrivingar 1. januar 2009 | -67.668.269 | -5.024.788 | -693.443 |
| Avskrivingar í árinum | -11.379.627 | -722.353 | -20.144 |
| **Avskrivingar 31. desember 2009** | **-79.047.897** | **-5.747.141** | **-713.587** |
| | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2009** | **223.017.178** | **845.718** | **170.473** |

### Nota 3. Eginogn

**Rørslur í eginognini 2009**

| | 1. januar | Broytingar í nýttum roknskaparhátti | Útgoldið vinningsbýti | Uppskot til býti av ársúrsliti | 31. desember |
|---|---|---|---|---|---|
| Partapeningur | 160.300.000 | 0 | 0 | 0 | 160.300.000 |
| Flutt úrslit | 3.090.589 | 0 | 0 | 403.366 | 3.493.955 |
| | **163.390.589** | **0** | **0** | **403.366** | **163.793.955** |

| **Partapeningur** | 2009 | t.kr. 2008 |
|---|---|---|
| Partapeningurin er býttur soleiðis: | | |
| 1 stk. áljóðandi 20.300.000 | 20.300.000 | 20.300 |
| 7 stk. áljóðandi 20.000.000 | 140.000.000 | 140.000 |
| | **160.300.000** | **160.300** |

Øll partabrøvini hava eins rættindi.

| | 2009 | 2008 |
|---|---|---|
| | | t.kr. |
| **Nota 4. Skattur av ársúrsliti** | | |
| Útsettur skattur við ársbyrjan | 1.297.808 | 1.203 |
| Útsettur skattur við ársenda | -1.386.352 | -1.298 |
| | **-88.544** | **-94** |
| **Skattur goldin í árinum** | **0** | **0** |

**Nota 5. Langfreistað skuld**

| | 1/1 2009 Skuld í alt | 31/12 2009 Skuld í alt | Avdráttur komandi ár | Restskuld eftir 5 ár |
|---|---|---|---|---|
| Íleggingargrunnurin fyri Føroyar | **85.619.706** | **53.645.340** | **11.583.600** | **0** |

Við verandi lánisáttmála við árslok 2009.

| **Veð- og eventualskyldur** | Veð lýst í | Veðupphædd |
|---|---|---|
| 1. Veð. Skbr. Íleggingargrunnurin, | matr.nr. 401b Kvívík | 200.000.000 |
| 1. Veð. Skbr. Íleggingargrunnurin, | matr.nr. 373e Sandavágur | 200.000.000 |
| 1. Veð. Skbr. Íleggingargrunnurin, | leysafæ, tekniskur útbúnaður | 200.000.000 |
| | | **600.000.000** |

**Eventualskyldur**
Øll teknað hald hava rindað eina trygd uppá kr. 300 fyri kubban, ið fæst aftur, um kubbin verður latin innaftur til felagið.

Felagið hevur í 2007 undirskrivað ískoytisavtalu til leigusáttmála um leigu av skrivstovuhølum á Skansavegi 7, Tórshavn fram til 1. juli 2012 við 3 mánaða uppsagnartíð, tó í fyrsta lagi 1. apríl 2012.

Felagið hevur undirskrivað tænastusáttmálar fyri røkt av vegum, undirsjóvatunli og útgerð pr. 22 oktober 2003 fyri 1,3 mió.kr. árliga.

Í 2008 er tvey ára avtala gjørd við P/F Mest um eftirlit og viðlíkahald av pumpuskipan.

**Tryggingarviðurskifti**

| | |
|---|---|
| All Risk-trygging: | |
| Skaða á tunnil-/útgerð | 25.000.000 |
| Rakstrartap | 5.000.000 |
| | |
| Virkisábyrgdartrygging: | |
| Skaða á persón | 70.000.000 |
| Skaða á lutir | 15.000.000 |
| | |
| Ábyrgdartrygging: | |
| Ábyrgd nevnd- og stjórn pr. skaða/ár | 5.000.000 |
| | |
| Leysafætrygging: | |
| Skrivstovuinnbúgv og útgerð | 230.000 |
| Telduútgerð og tøkni | 270.000 |
| Vørugoymsla | 1.000.000 |
| Databeraratrygging | 500.000 |
| Meirkostnaðartrygging | 500.000 |
| Flytandi samskiftisútgerð | 85.000 |

Bilur er ábyrgdar- og skrokktryggjaður. Arbeiðsskaða- og vinnuferðatrygging er teknað.

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársfrásøgnin hjá P/F Vágatunlinum, Tórshavn, fyri 2009 er gjørd í samsvari við ásetingarnar fyri fyritøkur í flokki B í ársroknskaparlógini og eftir galdandi roknskaparleiðbeiningum.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkurnar innroknaðar í stigum, so hvørt tær eru vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar og niðurskrivingar.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva fyritøkuni fíggjarligar fyrimunir, og virðið kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr fyritøkuni, og virðið kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiserað útveganarvirði, har ein støðug effektiv renta verður innroknað yvir tíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður uppgjørt sum upprunaligt útveganarvirði frádrigið møguligan avdrátt, umframt ískoyti/frádrátt av akkumuleraðu amortiseringini av muninum millum útveganarvirði og áljóðandi virði.

Innrokningar og virðisásetingar taka hædd fyri tapum og váðum, ið vóru væntað við roknskaparlok, sum síðan eru sannað ella avsannað, innan framløguna av ársfrásøgnini.

Roknskaparliga virðið á immateriellari og materiellari støðisogn verður gjøgnumgingið árliga, fyri at staðfesta um ábendingar eru um størri virðisminkingar, enn tær, sum eru í regluligu avskrivingunum. Um so er verður niðurskrivað til tað lægra endurútveganarvirðið.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### Nettosøla

Nettosølan er øll fakturerað og kontantsøla, har tænastan er veitt keyparanum innan árslok. Meirvirðisgjald verður ikki roknað av nettosøluni.

### Rakstrarkostnaður

Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá fyritøkuni. Meirvirðisgjald verður roknað av rakstrarkostnaði.

### Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um allan kostnað, sum stendst av at hava fólk í starvi. Tað er lønar- og eftirlønarkostnaður og øll sosial gjøld.

**Aðrar rakstrarinntøkur og annar rakstrarkostnaður**

Aðrar rakstrarinntøkur og annar rakstrarkostnaður fevna um inntøkur og kostnað, sum ikki hoyra til høvuðsraksturin hjá fyritøkuni.

**Menningarkostnaður**

Menningarkostnaður er kostnaðarførdur, tá slíkur kostnaður er komin fyri.

**Fíggjarpostar**

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum. Fíggjarligu postarnir fevna um rentuinntøkur og -kostnaðir, staðfestir og ikki staðfestir kursvinningar og -tap viðvíkjandi handlum í fremmandum gjaldoyra.

**Óvanligar inntøkur og kostnaður**

Óvanligar inntøkur og kostnaður fevna um upphæddir, ið ikki eru afturvendandi, og sum ikki hava nakað við vanliga rakstur felagsins at gera.

**Skattur**

Skattur av ársúrslitinum, ið fevnir um skattin fyri árið og broytingina í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum, og innroknaður beinleiðis á eginognina við tí parti, sum viðvíkur bókingum beinleiðis á eginognina.

## FÍGGJARSTØÐAN

**Materiell støðisogn**

Vegir, brýr, undirsjóvartunnil, tekniskur útbúnaður, tøkni, rakstrartól og innbúgv eru tikin við til útvegnarvirði, frádrigið avskrivingar. Avhendingarvirðið, sambært § 1,4 í "Anleggslógini", er sett til kr. 160.300.000.

Tól, ið kosta minni enn kr. 20.000, verða kostnaðarførd.

Avskrivingarnar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð og restvirði (livitíð) og verða gjørdar við eins stórum árligum prosentparti. Fyrsta árið verður avskrivað frá keypsmánaðinum:

| | |
|---|---|
| Vegir og undirsjóvartunnil | 10 - 14 ár |
| Tøkniútbúnaður | 3 - 5 ár |
| Rakstrartól | 5 ár |
| Innbúgv | 10 ár |

Vinningur ella tap við at avhenda støðisogn verða uppgjørd sum munurin millum søluprís, frádrigið sølukostnað, og tað roknskaparliga virðið á søludegnum. Vinningur ella tap verða innroknað í rakstrarroknskapin undir avskrivingum.

**Vørugoymslur**

Kubbar og eykalutir á goymslu verða virðisásett til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Nettorealisatiónsvirðið fyri vørugoymslur verður uppgjørt sum søluprísur, frádrigið kostnað til liðugtgerð og kostnað til at gjøgnumføra søluna, og verður ásett við atliti at sølubæri, ókuransi og gongdini á væntaðum søluprísi.

**Áogn**

Áogn er tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Virðið verður niðurskrivað eftir møguligum tapsvanda.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar undir ognum er goldin kostnaður, sum viðvíkur komandi roknskaparárum.

**Skyldugur skattur og útsettur skattur**

Skyldugur skattur verður tikin við í fíggjarstøðuna, sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku, við møguligum javningum fyri skatti frá undanfarnum árum.

Útsettur skattur verður uppgjørdur eftir fíggjarstøðugrundaða skuldarháttinum av fyribils mununum millum roknskaparliga og skattliga virðið á ognum og skyldum, uppgjørd við grundarlagi í ætlaðu nýtsluni av ognini ella afturrindanini av skylduni.

Útsett skattaáogn verður ikki tikin upp.

Útsettur skattur verður útroknaður við grundarlagi í galdandi skattareglum og skattaásetingum, sum við roknskaparlok eru galdandi, tá útsetti skatturin væntandi verður útloystur. Broytingar í útsetta skattinum, sum eru avleiðingar av broytingum í skattasatsum, verða tiknar við í rakstrarroknskapinum. Í hesum árinum er skattasatsurin 18%.

**Skuld**

Fíggjarligar skyldur verða innroknaðar sum lántøka til útveganarvirði, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verða fíggjarligar skyldur innroknaðar til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin, millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innrokaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Veðskuld er tískil innroknað til amortiserað útveganarvirði, sum fyri kontantlán svarar til restskuldina á láninum. Fyri brævalán svarar amortiseraða útveganarvirðið til eina restskuld, roknað sum lánsins undirliggjandi kontantvirði á upptøkudegnum. Harumframt verður kursmunurin avskrivaður yvir avdráttartíðina.

Onnur skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld, skuld til atknýttar fyritøkur og onnur skuld, verða tiknar við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virði.

**Umrokning av fremmandum gjaldoyra**

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyramunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin, sum ein fíggjarpostur. Um gjaldoyrapositiónir verða sæddar sum tryggingar fyri framtíðar peningastreymum, verða virðisjavningarnar innroknaðar beinleiðis á eginognina.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða innroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarligum inntøkum og kostnaðum.

Støðisognir, ið eru keyptar í fremmandum gjaldoyra, verða innroknaðar til kursin á handilsdegnum.

**Frammanundangoldin kubbahald**

Frammanundangoldin kubbahald eru tikin við til áljóðandi virði frá byrjan og fram til roknskaparárslok.

**Trygd, kubbar**

Trygd, kubbar eru tiknir við til áljóðandi virði, svarandi til kr. 300 fyri hvønn teknaðan kubba.

**GJALDFØRISFRÁGREIÐING**

Gjaldførisfrágreiðing er uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir gjaldførisávirkanina frá rakstri, íløgum og fígging.

Gjaldføri við roknskaparbyrjan og við roknskaparlok er samansett av tøkum peningi og innistandandi í peningastovni.

**LYKLATØL**

Lyklatølini, sum standa í brotinum høvuðs- og lyklatøl í ársfrágreiðingini, eru roknað soleiðis:

$$\text{Ognaravkast} = \frac{\text{Rakstrarúrslit x 100}}{\text{Miðal ognir}}$$

$$\text{Trygdarevni} = \frac{\text{Eginogn x 100}}{\text{Skyldur tilsamans}}$$

$$\text{Renta av eginogn} = \frac{\text{Ársúrslit x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$$